Aftursvar til Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther

Í Sosialinum og Dimmalætting tann 16. desember 1989 leika Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther, harðliga í móti mínum persóni, ja, skriviháttur teirra er ikki mætari enn ein í ávísum, verða tey nevnd eru tey kend, bløðum fyrr hevur lisið um navngivnar persónar.

Víst verður í greinini á eina samrøðu, ið eg havi havt við Dimmalætting 9. des. 1989, har eg sigi, at vit fara at leggja endurgjaldskrav ímóti Statens Luftfartsvæsen, tí vit meina at samhugaverkfallið var ólógligt. Annað havi eg ikki sagt, og eg kann endurtaka tað, eg haldi samhugaverkfallið var ólógligt.

Tað verður tó ikki nevnt, at Svend Andresen, Statens Luftfartsvæsen í somu grein sigur, at hann heldur ikki er í iva um at samhugaverkfallið er ólógligt. At vit ella teir fimm sakførararnir ikki enn hava prógvað tað, er sjálvsagt tí at einki sakarmál hevur verið.

Eg segði eisini í 1983, at tað tiltakið, ið Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther gjørdi ímóti øllum flakavirkjum, tá ið Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther um Útvarp Føroya noktaði limum sínum at leggja merki í bakkarnar, var ólógligt. Tað tók heili seks ár at prógva, at eg hevði rætt. Prógvið kom í ár, tá ið Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther í gerðarrættarúrskurði fingu hetta at vita.

Man tað ikki vera her hundurin er grivin, tá ein í ljóta orðaljóðinum í greinini merkir eina hatafulla persónsjagstran. Tað er einaferð so, at tað skulu tveir partar til at gerast ósamdir, men sjálvt um ikki annar parturin ger akkurát sum hin sigur, ber ikki til at leggja hann fyri hatur.

Tað verður nevnt, at eg eri farin harðliga fram móti føroysku fakfelagsrørsluni undir verkfallinum á flogvøllinum, hetta nokti eg púrt, tí eg havi fingið ábreiðslu frá limum í Føroya Arbeiðarafelag, fyri at eg ikki havi lagt meg uppí verkfalsósemjuna.

At roknikynstrið hjá Ingeborg Vinther ikki er størri enn so, at hon ikki finnur út av, at um ein hevur eitt hall uppá 6.000.000 kr. og so fær eitt óvæntað tap uppá 1.500.000 kr. afturat, at so verður hallið 1.500.000 kr. størri, ja, tað vildi eg forsvorið. Og at sløkkiliðsmenninir skuldu fara til hús, tí eg gjørdi tað arbeiði, eg eri settur til at gera, ja, tað trúgva teir ikki sjálvir uppá.

Um mínar »skitnu labbar« kann eg siga, ja, eg havi havt skitnar labbar síðan eg sum 16 ára gamal fór at arbeiða í kolaminu, og ikki blivu teir reinari av at eg 27 ára gamal fór í smiðjulæru, og ofta hava teir verið skitnir seinni eisini, eg havi aldrin verið bangin fyri at taka hendurnar í, tá ið á stendur, men at Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther, skal halda menn við skitnum labbum fyri gjøldur, tað hevði fingið Gunnar Petersen sála, at vent sær í grøvini.

Hvat viðvíkur hækking av ferðaseðlum er bert at siga, at umsóknin til Føroya Landsstýri og Trafikministeriet var nevndarviðgjørd og send áðrenn verkfallið byrjaði, og er orsøkin til hækkingina — um hon verður játtað — bert tann, at flúgviútreiðslurnar eru hækkaðar við tilsamans 11,434% síðan við 28. mars 1988 byrjaðu at flúgva.

Heldur enn at skriva hatafullar greinar um mín persón, haldi eg, at Føroya Arbeiðarafelag — Ingeborg Vinther, átti at greitt Føroya fólki frá hesum báðum lesarabrøvunum, sum eisini stóðu í Dimmalætting 9. des. 1989, og um tað ikki akkurát var ein harðrend framferð av Ingeborg Vinther, sum var orsøkin til at menninir á platforminum nú fáa 1000 kr. minni um mánaðin enn teimum stóð í boði undir samráðingunum, og at tey á hotellinum og matstovuni 520 kr. minni um mánaðin. Um hetta er úrslitið, so hevur onkur misfatað sítt arbeiði.

Sørvágur,
18. desember 1989
Heri Mortensen



BRØV til Dimmalá

Verkfall – og hvat so?

Nú verkfallið á flogvøllinum er av, hava bløðini roynt at gjørt støðuna upp.

Til viðgerðar hevur verið spurningurin um nakar vinnari var, hvør hesin var og hvør var taparin.

Í flestu bløðum hava hesar metingar verið varisligar, men hóast tað, sær út til at vera semja um, at Flogfelag Føroya í hvussu er varð taparin. Er hetta nú rætt?

Allir partar í verkfallinum hava frá byrjanini roynt at greitt frá støðuni sum best í bløðunum og fjølmiðlunum. Frágreiðingar vóru at kalla í hvørjari blaðútgávu frá pørtunum og er niðurstøða mín bygd á tað, sum frammi hevur verið frá báðum pørtum í bløðum, útvarpi og sjónvarpi.

Fyri at byrja við úrslitinum, so varð nógv gjørt burturúr, at FA nú hevði fingið ein sersáttmála við FAG fyri teir tríggjar bólkarnar av starvsfólki hjá Flogfelag Føroya.

Til hetta er at vísa á, at Sørvágs Arbeiðarafelag frammanundan, síðan 1982, hevur havt sersáttmála fyri hesi somu fólk við Flogfelag Føroya. So her er einki nýtt komið fram, men einans ein staðfesting av tí sáttmálasmíði, sum var frammanundan.

Sambært útvarpið er lønin hjá avgreiðslumonnunum avtalað til 14.235 kr. um mánaðin frá 1. oktober 1989. Afturat hesum kemur ein viðbót fyri ólagaliga arbeiðstíð uppá 420 kr. um mánaðin. Tilsamans gevur hetta 14.655 kr. um mánaðin.

Samanbera vit úrslitið við tað, sum Flogfelag Føroya vildi ganga við til undir samráðingunum 7. august 1989 (sambært frágreiðing í bløðunum frá Føroya Arbeiðarafelag), nevniliga 15.700 kr. (6,7% lønarhækking yvir 2 ár umframt viðbót uppá ½ tímansløn fyri at arbeiða í døgurðatímanum), so sæst týðuliga, at verkfallið hevði við sær, at hesi fólk nú fáa 1000 kr. minni í løn um mánaðin.

Neyðugt er eisini at vísa á, at tilboðið frá Flogfelag Føroya hevði afturvirkandi gildi frá 1. mai í ár, meðan verkfalshækkingin kom í gildi 1. oktober í ár ella 5 mánaðir seinni.

Um lønina hjá starvsfólkunum á hotellinum og matstovuni er at siga, at tilboðið frá Flogfelag Føroya 7. august í ár hevði havt við sær, at tey frá 1. mai í ár fingu eina mánaðarløn uppá 13.500 kr. mótvegis verkfalsúrslitinum uppá í mesta lagi 13.000 kr. um mánaðin frá 1. oktober í ár. Altso 500 kr. minni um mánaðin.

Óneyðugt er at gera tað stóra burturúr inntøkumissinum hjá starvsfólkunum uppá eina heila mánaðarløn av verkfallinum.

Eg spyrji: Var Flogfelag Føroya tapari og var FA vinnari?

Eygleiðari.

Hvør vann verkfallið?

Aftaná eitt verkfall verður sjálvsagt mett um hvør ið vann, og tað er eisini mett dúgliga um hetta aftan á verkfallið í Vágunum. Bløðini tykjast at meta FA sum vinnara, og eitt blað ynskir nú um dagarnar eina »jarnkvinnu« til formann í Havnar Arbeiðsmannafelag, so arbeiðsmenn í Havn kunnu vinna líknandi sigrar.

Eingin hevur tó enn mett um, hvat verkfallið gav í krónum og oyrum afturat tí, sum var í boði, tá verkfallið varð lýst. Her kann so bert verða farið eftir tíðindaskrivum í bløðunum. Samb. Flogfelag Føroya bjóðaðu teir sær til pr. 1. oktober at gjalda kr. 15.001,25 pr. mánað til menninar á flogvøllinum, og henda upphædd skuldi hækkast við kr. 500 pr. 1. maj 1990. Afturat hesum varð boðin ein viðbót uppá ½ tímaløn pr. dag sum endurgjald fyri døgurðatíman. Hetta vildi givið uml. kr. 750 pr. mánað.

Úrslitið aftaná 4 viku verkfall gjørdist ein mánaðarløn uppá kr. 14.235 og eina viðbót, sum er mett at geva kr. 420 ella tilsamans kr. 14.655. Og lønarhækkingin komandi ár verður kr. 350 um mánaðin.

Fólkið á hotellinum og cafeteria fekk samb. somu tíðindabrøv í boði somu viðbót uppá kr. 750 afturat vanligum fast lønarsáttmála.

Úrslitið gjørdist sum kunnugt kr. 2 leygardag og kr. 5,50 sunnudagar, og gevur hetta í mesta lagi fyri ein mánað kr. 200.

So spurningurin er, um verkafólk hava brúk fyri nógvum sigrum av hasum slagnum!!

Spyrjandi.

---

tjak og meiningar

Sáðið vit sáa — á leið móti kaos

Átrúnaðarliga nationalisman, antisemitisman og rasisman rekur sum køld skadda út úr russisku kirkjunum í hesum døgum og fanatisman pøsar olju á stórbrandarnar, ið sum hundaland stinga seg upp í Sovjetsamveldinum.

Sjálv fortreytin fyri zardespotinum, tann egentliga statsmaktin, ið var í Ruslandi, tær russisku kirkjurnar, hava síðan 1917 ulmað og andað og saman við Voice of America og Wurmbrand hevur tað nú loksins eydnast teimum at bráka stabilitetin í einum heimsveldi.

Ivaleyst fara framtíðarsøguskrivarar, um nøkrum verður lív lagað, at takka russum fyri leiklut teirra í niðurberjanini av stórtýska triðja ríkinum hjá Adolfi Hitler og ikki minni at takka fyri friðin, ið valdað hevur í Europa í 50 ár. Tað man sum frá líður fara at kennast djúpkend aftran og ikki sørt kann tað gerast lagnukend ironi, hetta tá hin amerikanska forsetamarionettin Reagan, ið kávalótum og av teatralskum grundum heitti á russar um at bróta niður tann múrin, ið hildið hevur nationalismunar vøggu so nøkurlunda í skák í hálvt hundrað ár.

Himmalin viti, um ikki heimurin her hevur biðið um rís til egnu reyv.

Manipulatiónirnar við fólkasálini, støðuga skipaða propagandain, ið oyst hevur verið úr Vesturheiminum niður yvir russiska fólkið, man nú sum altíð áður í blóðugu søgu mannaættarinnar fara at føra til sama ragnarokið, sum søgan blað fyri blað higartil veit um at siga.

Eitt eru vápnini, men einvís skipað, devulsett propaganda man fara at teljast dýrasta eksperiment, mannaættin nakrantíð hevur spælt sær við.

Tað eru ikki vápnini — *enn* — sum fáa múrarnar at falla, nøra um ónøgdina, hatrið og mismunin og úrslitið gevur seg sjálvt. Nú eysturtýskarar floymdu vestur um, fingu teir sjón fyri søgn — vestur vísti seg ikki vera forjættaða landið, teir høvdu hoyrt um í hálvt hundrað ár. Vesturtýskland var ikki friðarligt býtið av grind, tað var eirindaleys jagstran eftir fongi, har slóðin var gird og kantað við sorlaðum mannalagnum, tey, ið ikki kláraðu at renna skjótt nokk, til tess at tryggja sær so frægt sum avroðini.

Kenslan av lukku er eisini relativ og í 50 ár hava USA og Vesturheimurin sagt russum, at teir eiga ikki at kenna seg nøgdar og glaðar, sjálvt ikki samanborið við ræðuleikastøðuna so sum hon var áðrenn kollveltingina í 1917.

Teskað hatur, nør um misnøgd og øvundsjúku og set ferð í nationalistiska skrímslið og fólkasálin sjálv, blindað av fanatismunnar brandi, rættvísgjørd við og íblandað átrúnaðarligt vanvid, hesar eru tær kreftirnar, vit hava nørt um. Og vápnini fara lítið at muna, tí tað var opiniónin, fólkasálin sjálv, ið rendi múrin um koll.

Øll hava rætt. Spurningurin er bert um tað er tað rætta, øll hava rætt í.

J.S.